**Hugskot og viðmerkingar** – *send sms til 225000*

# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# KORTINI BLANDAÐ AV NÝGGJUM

Í dag fara 7.024 børn aftur í skúla eftir at hava hildið summarfrí í sjey vikur.

Tað broytir aftur gerandisdagin hjá teimum flestu – tí so at siga øll merkja broytingina, bæði tey, sum hava børn, og øll hini. Tí nú byrjar gerandisdagurin aftur, nú byrjar nógva morgunferðslan aftur. Tað merkist, at skúlarnir aftur fara til verka, tí nú er alt sum tað eigur at vera.

Tað setir eisini krøv til okkum, sum ferðast í ferðsluni, at nógv børn aftur fara at ferðast á vegunum um morgunin. Ikki minst setir tað krøv, at 715 børn nú á fyrsta sinni fara í skúla og tí skulu venja seg við at ferðast í ferðsluni.

Í blaðnum fríggjadagin skrivaðu vit úr kanning, sum er gjørd um trivnaðin hjá ungum í skúlanum. Hendan kanning vísti millum annað, at 11 prosent halda skúlan vera meiningsleysan, at 36 prosent keða seg ofta ella altíð, at 64 prosent ikki gera sær nóg stóran ómak, at 46 prosent siga seg ikki trívast, at 35 prosent hvødu viljað givist, at 50 prosent siga seg ofta ella altíð umhugsa at skifta skúla, og at 27 prosent siga seg semjast illa við lærarar.

Hetta eru døpur hagtøl, sum bæði lærarar, skúlamyndugleikar og foreldur eiga at taka í nógv størri álvara. Uppfylgjandi kanningar mugu eisini gerast fyri at finna út av, hvussu umfatandi hesir trupulleikar eru, sum lýstir eru í hesi tvey ára gomlu kanning.

Læraraformaðurin tykist at vera í døpurhuga. Hann kundi hugsað sær meiri eftirútbúgving av lærarum, so tey betur kunnu skilja dagsins samfelag, samstundis sum hann sendir eitt signal út um, at vit ikki mugu útbúgva so nógvar ungar lærarar.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tað er upp til læraran at tryggja, at undirvísingin er viðkomandi – hóast hann samstundis viðgongur, at her er ein stór avbjóðing.



Meðan læraraformaðurin gremur seg um, at hann ikki fær orðið á Mentamálaráðið, so heldur landsstýrismaðurin, at hann hevur eitt gott samstarv við lærarafelagið.

Her er fatanin næstan líka ymisk sum millum næming og lærara.

Sjálvsagt krevst gott samstarv millum heim og skúla og skúla og skúlamyndugleikar, fyri at vit skulu fáa tað besta burturúr.

Nú er nýtt skúlaár byrjað – og í stóran mun eru kortini blandað av nýggjum – vónandi kunnu lærarar og skúlamyndugleikar finna stevið, eins og foreldur og skúli.

Í ferðsluni mugu vit øll verða árvakin – og minnast til tey smæstu.

**Við nýggjum skúlaári byrjar nýggjur gerandisdagur**

# Paul Watson: Rasuskilnaður heima á Sandi

**Rasuskild toilett? spyr Paul Watson, ørkymlaður, eftir atgerðina hjá Brandi Sandoy at nokta útlendingum at nýta almenn nátthús á Sandi**



Hjá neðyars Watson fella tankarnir á Selma, Alabama tíðliga í sekstiárunum, Apartheidstýrið í Suðurafrika 1948-1994...

Men hetta er á Sandoy í Føroyum, sigur hann, skakkur og vísir á, at tað er borgarstjórin á Sandi sum hevur givið hesar ordrar. Og ikki nóg mikið við tí:

– Brandur Sandoy er eisini løgtingsmaður, so kanska alt løgtingið í Føroyum stuðlar hesum skiljaðarpolitikki, sigur Paul Watson, sum sigur seg fara at kanna, um hetta ikki er í stríð við mannarættindi.

Føroyskir viðmerkjarar á Facebook taka hetta eitt sindur lættari. Ein teirra skrivar soleiðis:

*– Hasin á vegginum dugdi væl at ansa eftir wc-pappíri og øðrum vørum í hølunum hjá Skipafelagnum í Sørvágiii. Kanska kundi hann fingið eitt lítið starv á vesinum á Sandi?*

*– Tað skal loysa seg at arbeiða...*



**Dansurin um SEV kálvin**
JÓGVAN ARGE
KJAK SÍÐA 22



**Altíð lættari at flyta fokus**
GUNVÁ VIÐ KELDU
KJAK SÍÐA 19

# Karsten Hansen sjeyti ár í dag



Í dag fyllir Karsten Hansen, landsstýrismaður í heilsumálum, sjeyti. Hann er føddur í Søldafyriði 18. august 1944.

Karsten Hansen er landsstýrismaður fyri Miðflokkin og hevur fyrr verið landsstýrismaður og løgtingsmaður fyri Tjóðveldi. Áðrenn hann varð politikari var hann sýslumaður.

Karsten Hansen starvaðist sum sjómaður 1959-62 og innan handil 1963-66. Hann er útbúgvin løgreglumaður, og varð løgreglumaður í 1966, var støðleiðari 1975-85 og sýslumaður frá 1985 til hann fór í farloyvi, tá hann gjørdist landsstýrismaður í 1998.

Hann var landsstýrismaður í fíggjar- og búskaparmálum 1998-2002 og landsstýrismaður í fíggjarmálum 2002-2003 umboðandi Tjóðveldisflokkurin. Hann var aftur landsstýrismaður í fíggjarmálum 4. februar til 26. september 2008, hesaferð umboðandi Miðflokkin. Hann hevur verið landsstýrismaður í heilsumálum síðani 14. november 2011, umboðandi Miðflokkin.

Karsten Hansen varð valdur á ting í 2004 fyri Tjóðveldi og í 2008 fyri Miðflokkin. Hann var ikki afturvaldur á løgtingsvalinum í 2011.

Karsten Hansen sat í Klaksvíkar Býráð 1989-98, harav sum næstformaður 1993-98. Hann var nevndarformaður í IRF 1993-98, í Vanlukkutryggingarráðnum 1985-89. Hann var formaður í Føroya politistafelag 1973-84.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Tíðindaleiðari**
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*